# Byggisamtyktin fyri Sumbiar kommunu

# 2015

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða hesar ásetingar at galda fyri Sumbiar kommunu:

**1. grein. Økið, byggisamtyktin fevnir um**

1. Byggisamtyktin fevnir um alla kommununa, innan- og uttangarðs

2. Kommunan verður sundurbýtt soleiðis eftir nýtsluni av økjunum:

3. Økini eru innstrikað á kortskjali, sum er partur av byggisamtyktini,í máti 1:1000 og 1:5000 og frámerkt við avvarðandi bókstavi. Økispartarnir til landbúnað hava tó ongan bókstav.

A: Sethús

B: Miðstaðarendamál

C: Vinna

D: Vegir og parkering

E: Almenn endamál

F: Almenn frítíðarøki

G: Fríøki

H: Landbúnaður

I: Summarhús

J: Havnarøki

**2. grein. Byggivaldið**

Byggivaldið í Sumbiar kommunu útinnir kommunustýrið sambært løgtingslóg um býarskipanir og Byggisamtyktir og sambært løgtingslóg um at byggja bygningar.

**3. grein. Ásetingarnar í samtyktini galda fyri:**

1. Nýggja bygging.

2. Umbygging ella bygging afturat byggingum, ið eru.

3. Broyting í innrætting ella nýtslu av bygningum, ið eru, og sum høvdu komið undir samtyktina, um tær vóru nýbyggingar. Samtyktin er eisini galdandi fyri byggingar, sum eru, tá ið tær einstøku reglurnar beinleiðis heimila hetta.

**4. grein. Til bygging verður roknað:**

1. Fastar konstruktiónir og virki, ið eftir ætlanini í byggisamtyktini mugu lýsast sum bygging.

2. Flytiligar konstruktiónir, eitt nú bingjur, tjøld, bátavognar ella tílíkt, tá tær eru nýttar sum bygging, ið ikki bert er fyribils.

3. Tangar, kranar, flutningsbrýr, tunlar, pallar og líknandi konstruktiónir.

4. Bygningar, ið eru, mugu ikki við um- ella afturatbygging, hækkan ella á annan hátt verða broyttir, soleiðis at teir stríða ímóti galdandi reglum.

5. Skal so víðgongd umvæling ella broyting verða gjørd av bygningum sum eru, at allur bygningurin í høvuðspørtum verður endurnýggjaður (høvuðsumbygging), skal arbeiðið - um gjørligt - verða gjørt soleiðis, at bygningurin í øllum lutum samsvarar við tær ásetingar, ið galda fyri nýbygging.

6. Nýbygging, broytingar, um- ella afturatbyggingar og høvuðsumbyggingar skulu, umframt at vera í samsvari við galdandi byggisamtykt, eisini halda møguligar býarskipanir, serstakar byggisamtyktir, servituttir og lóggávu í aðramáta.

**5. grein. Byggiumsókn**

1. Byggiumsókn skal vera skrivlig og hjálagdar henni skulu vera tær tekningar og aðrar upplýsingar, ið neyðugar eru til at lýsa málið, herundir upplýsingar at eyðmerkja bygningin, upplýsingar um, hvat bygningurin verður ella fer at verða nýttur til, og umsókn um frávik, um so er, at ætlaða byggingin gongur ímóti ásetingum í hesi byggisamtykt.

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA

2. Allar umsóknir, her uppi í umsóknir um loyvi til at grava fyri grund og møguligar spreingingar, til broytingar, taka niður ella flyta hús, vega-, kloakk- og frá renningar arbeiði, skulu verða sendar kommunustýrinum.

3. Tekningar og útrokningar skulu verða gjørdar av fólki, ið fakliga eru før fyri hesum, og skulu tekningar og útrokningar teirra lúka tey krøv, ið vanliga verða sett til tekniska projektering. Allar tekningar, planir, frágreiðingar, útrokningar o.t. fylgiskjøl hjá byggiumsókn, skulu verða dagfest, hava matr. nr. á ognini, og hann, ið hevur sett tey upp, skal skriva undir í høgra horni. Hesin hevur ábyrgd av, at tey eru fullgóð.

4. Sum fylgiskjøl við umsóknini um húsa- og virkisbygging skulu verða hjáløgd:

a. Støðuplanur, ikki minni enn 1:1000, sum vísir støðd, skap og hædd á byggigrundini, hvussu hon vendir móti gøtum og ættum, hvar og hvussu ætlað hús skulu standa, og ætlaða vatnburturveiting.

b. Flatmyndir av húsunum í máti í minsta lagi 1:100 við áskrivaðum mátum, bæði høvuðsmátum og gjøgnumgangandi stakmátum. Skilast skal til, hvat rúmini eru ætlað til.

c. Tvørskurðir í minsta lagi 1:50, ið neyðugir eru fyri at fáa eina fatan av húsunum og tekningar av øllum útsíðum á húsunum. Frágreiðingar, ið saman við tekningum geva fullfíggjaða og greiða lýsing av tí ætlaðu byggingini.

d. Umsóknir við tekningum, frágreiðingum og útrokningum - her uppi í eisini útrokning av byggi stiginum ella netto nýtslu stiginum - og onnur fylgiskjøl skulu verða innsendar í tveimum eintøkum og skulu hava allar upplýsingar, ið neyðugar eru fyri greitt at skilja og fáa avgjørt tað, ið søkt er um.

e. Frávik frá byggisamtykt ella servituttum skulu greiniliga vera tilskilað, og samstundis skal vera upplýst, um loyvi til frávik er fingið. Slík frávik eru bert roknað fyri játtað, tá tey hava verið nevnd í umsóknini og tilskilað er í byggiloyvinum.

**6. grein. Byggiloyvi og byggiváttan**

1. Bygging má ikki fara fram uttan skriftligt loyvi frá kommunustýrinum ella tí, ið stýrið hevur givið fulltrú. Eitt makaskjal av byggiloyvinum skal vera varðveitt á skjalagoymslu býráðsins.

2. Verður farið undir at byggja, áðrenn byggiloyvi sambært stk. 1 fyriliggur, skal kommunali byggimyndugleikin geva boð um at steðga byggingini.

3. Eitt byggiloyvi kann verða býtt í partar, um kommunali byggimyndugleikin metir, at byggingin kann byrja, uttan at endalig greiða er fingin á øllum viðurskiftum ella stigum í byggingini.

4. Eitt byggiloyvi kann vera bundið av treytum, sum vera hildnar neyðugar, tá ið hugsað verður um dálking, umhvørvi og konstruktión, her uppií innkoyring, bil støðlar og tún, og av heildar

byggiætlan fyri økið, ið talan er um. Letur kommunali byggimyndugleikin umsøkjara treytað byggiloyvi, skal tað í loyvinum týðiliga vera ásett, hvørjar treytir tað snýr seg um við tilvísing til heimildargrundarlagið.

5. Byggiloyvi kann somuleiðis vera givið treytað av trygdartiltøkum (eitt nú girðing, skorðum, skjól taki o.ø).

6. Um so er, at í byggiloyvinum er tilskilað krav um, at ásetingar, ið ikki standa í byggisamtyktini, skulu vera lúkaðar, skulu slík krøv verða tilskilað saman við upplýsing um heimildina fyri teimum og, um so er, at kravið er sett fram av øðrum valdi enn byggivaldinum, upplýsing um hetta og um, hvar ein kæra um hetta krav kann verða send inn og møguliga innanfyri hvørja freist.

7. Tá ið bygging er liðug, skal byggivaldið hava fráboðan, og byggiváttan kann útvegast treytað av, at byggingin er gjørd í samsvari við innsendu tekningar, byggisamtyktina og treytir annars í byggiloyvinum.

8. Um byggivaldið krevur liðugt sýn av bygging, verður hetta fráboðað í byggiloyvinum ella treytunum sum lagdar verða við byggiloyvinum.

**7. grein. Umsiting og niðurtøka av bygningum**

1. Um umstøðurnar eru soleiðis, at ein bygningur verður hildin at vera til vanda fyri íbúgvar ella onnur fólk, kann byggivaldið - uttan at neyðugt er at hoyra um hetta framman undan – krevja byrging ella um neyðugt burturflyting av fólki úr hesum húsum ella úr granna húsum. Niðurtøka- og byggiarbeiði skulu vera væl úr hondum greidd, og í samsvari við tær ásetingar, ið kommunustýrið fyrisetur, har uppií tað, ið er burturtøka ella hyljing av undirstøðum o.a. vega økinum viðvíkjandi.

2. Hevur bygningur innleggingar til frárenningar, vatn, ravmagn, telefon ella tílíkt, er ikki loyvt at fara undir arbeiði, fyrr enn skrivliga er boðað avvarðandi valdi ella felagi frá.

**8. grein. Trygging, meðan bygt verður**

1. Tá ið grivið ella sprongt verður fyri grund, skal tann, ið byggir, taka til øll neyðug tryggingar ráð til at verja fyri vanda ella skaða.

2. Hevur veggur ella onnur bygging skotist soleiðis ímóti marki at annan mans ogn, at hesin hevur ampa av tí, so er byggivaldinum heimilað at geva boð til tess at gera tey í hesum føri neyðugu byggingartiltøk.

3. Kommunali byggimyndugleikin kann í hesum førum geva einum eigara tíðaravmarkað loyvi til at nýta part av grannagrundøki:

1) Tá ið tað er neyðugt at tryggja uppatliggjandi grundøkir, bygningar og leiðingar í sambandi við byggibúgving, útgrevstur ella lendisbroyting á egnum grundøki.
2) Tá ið tað er neyðugt, fyri at eigari kann gera eitt byggi-, umvælingar- ella viðlíkahaldsarbeiði á egnari ogn.

4. Nýtslan av grannaøki skal fara fram á ein slíkan hátt, at minst møguligur ampi stendst av hesum. Tá ið arbeiðið er liðugt, skal tann, sum hevur fingið loyvið, skjótast gjørligt fáa grannaøkið aftur í sama standi sum áður.

**9. grein. Revsing fyri brot á fyriskipanirnar í byggisamtyktini v.m.**

1. Sektaður verður:

a. Hann, ið uttan fyrisett loyvi byrjar nakað arbeiði, sum kemur undir ásetingar í byggisamtyktini.

b. Hann, ið letur vera at boða kommunustýrinum frá nøkrum, ið fyrisett er.

c. Hann, ið fer at nýta bygging uttan fyrisetta váttan ella bráfeingis loyvi.

d. Hann, ið tálmar eftirkanning, ið er lógliga heimilað.

e. Hann, ið ikki ger eftir lógliga frásøgdum boðum.

f. Hann, ið letur vera við at greiða úr hondum tey av byggivaldinum fyrisettu umsitingararbeiði, ið eru neyðug fyri at íbúgvararnir í húsunum ella onnur fólk ikki koma í vanda.

g. Hann, ið annars ger brot á hesa almennu byggisamtykt og á ásetingar í serstøkum byggisamtyktum, ið eru góðkendar av landsstýrinum, uttan at brotið kann verða talt upp í ásetingarnar a - g.

2. Tá ið revsing verður ásett, skal vera farið eftir tí fíggjarvinningi, ið fingin er ella var ætlaður at fáa av ólógliga gjørdum arbeiði.

3. Tað er skylda hansara, ið til eina og hvørja tíð eigur eina ogn, at rætta tað, ið ólógligt er á henni.

4. Snýr brotið seg um nýtslu av ognini, og eigarin hevur givið brúkaranum tey neyðugu boðini um skyldur, hevur brúkarin ábyrgdina.

5. Verður farið undir arbeiði, sum kemur undir ásetingarnar í byggisamtyktini, uttan at fyrisett loyvi er fingið, kann byggivaldið krevja, at løgreglan beinanvegin setir bann fyri at hildið verður fram við hesum arbeiði.

6. Tá ikki verður gjørt eftir skyldu til at rætta ólóglig viðurskifti (ólógligt lag), ið er álagt við dómi, áðrenn tann til henda ásetta tíðarfreist er umliðin, og tá ið innheinting av sektum, ið dømdar eru,

ikki verður hildin at fáa ætlaða úrslit, kann byggivaldið krevja hjálp frá løgregluni til at fáa atgongd til at gera tað, ið byggivaldið heldur vera neyðugt, til tess at viðurskiftini verða lóglig.

7. Starvsfólk byggivaldsins ella umboðsmaður byggivaldsins hava saman við løgregluni, móti at vísa hóskandi samleikaprógv, uttan rættarúrskurð atgongd til allar bygningar fyri at kanna eftir, um og í hvønn mun ein bygging er í samsvari við galdandi lóg, og um ásetingarnar í samtyktini eru hildnar.

**10. grein. Undantaksloyvi**

1. Byggivaldið kann, har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi, geva lættar viðvíkjandi ásetingunum í hesari byggisamtykt.

2. Áðrenn undantaksloyvi verður givið, skal boð sendast grannunum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur, frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi.

**11. grein. Kæra**

1. Avgerðir kommunustýrisins sambært hesi byggisamtyktunum kunnu kærast til Kærunevndina í lendismálum.

2. Kærufreistin er 30 dagar frá tí degi, avvarðandi fekk avgerðina at vita og upplýsing um hesa freist og um, til hvat vald kært kann verða. Fyri avgerðir, ið alment eru kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá hesum degi.

3. Kæra um fyriskipan, ið byggivaldið hevur givið, frítekur ikki frá at gera eftir henni; tó er kæruvaldinum heimilað at áseta, um kæran skal kunna leingja tíðarfreistina í málinum.

4. Sakarmál, til tess at royna avgerðir, ið tiknar eru av Kærunevndini sambært hesi byggisamtykt, skulu verða gjørd innan 6 vikur, frá tí degi, avgerðin er boðað tí avvarðandi. Viðvíkjandi avgerðum, ið eru alment kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegnum.

**12. grein. Tilhaldspláss og bilstøðlar**

1. Trygd skal veitast fyri, at nóg stórt uttandura tilhaldspláss er til tey, ið búgva og/ella arbeiða í húsunum.

2. Nóg stórt øki skal vera lagt av til bilstøðlar, soleiðis at íbúgvararnir og/ella tey, ið starvast í húsunum og vitjandi, viðskiftafólk, útvegamenn o.o. fáa sett akfarið frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini.

SUMBIAR SOKNAR KOMMUNA

3. Har tað ber til verður kravt í minsta lagi pláss til 2 bilar til hvønn bústað sær. Har felags bilstøðupláss verða gjørd til fleiri bústaðir, ella har talan er um hús til vinnulig endamál, skal góðkenning frá byggi valdinum fyriliggja í hvørjum einstøkum føri.

4. Byggivaldinum er heimilað at gera av, hvussu grundstykki verður girt móti granna og vegi.

## Ásetingar fyri einstøku økini

### 13. grein. Ásetingar fyri øki A (Sethús)

1. Loyvt er einans at byggja sethús við upp til tveimum íbúðum og tvíhús og, sambært serstakari byggisamtykt, tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við búðstaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av, at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.

2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m² til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, ið kommunustýrið hevur góðkent og tryggjað, ella eftir serstakari byggisamtykt, kann kommunustýrið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 km², tó í minsta lagi 400 km² fyri sethús (einhúskishús) og 300 km² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av ásettu minstu víddini kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,35 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús. Netto nýtingarstigið fyri bygging á verandi eldri grundstykkjum, ið eru minni enn ásett í grein 2, verður útroknað samsvarandi grein 25.

4. Hús mugu einans verða bygd í tveimum hæddum við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6,0 m. til yvirgrind og 9,0 m. til mønuna mált frá miðaljørðildi (miðal við húsahornini). Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m. oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendinum, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 m., er tó loyvt at leggja kjallara loftið upp til 2,5 m. oman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera. Har bygging er framvið vegi, kunnu vega myndugleikarnir áseta hæddina á kjallara loftinum í mun til veg hæddina.

5. Hóast ásetingarnar í 2. 3. og 4. petti kann verða loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum t.d. dur, baðirúm, fýrrum o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.

### 14. grein. Ásetingar fyri øki B (Miðstaðarendamál)

1. Økið verður lagt burtur av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovursamkomuhøli, heilsubótarstovur o.t.. Í serstøkum førum er loyvt at innrætta íbúð til virkiseigaran ella starvsfólk.

2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.

3. Hús kunnu í mesta lagi verða bygd í 2 hæddum við nýttum lofti og skulu annars ikki vera hægri enn 7 m til yvirgrindina og 10 m til mønuna, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahornini). Kjallari verður roknaður uppí sum húsahædd, um so er, at loftið er meira enn 1,0 m yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera.

4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. stk í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrligt avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.

**15. grein. Ásetingar fyri øki C (Vinna).**

1. Økið verður lagt av til atvinnuvirki, t.e. heilsøluhandlar, goymslur, verkstaðir, ídnað og

tænastuvirksemi. Í serstøkum førum verður loyvi givið til at innrætta íbúð til virkiseigaran ella starvsfólk.

2. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 600 $km^2$ til støddar.

3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.

4. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 12,0 m. til mønu og 9 m til yvirgrind, mátað frá miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

5. Loyvt verður at umvæla verandi hús, so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu, tó má byggistigið ikki fara upp um 0,5.

6. Frávik kunna verða gjørd frá ásetingunum í 3. og 4. petti, í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrligt avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið ikki fara upp um 1,0 og hæddin ikki uppum 15,0 m. (miðal við húsahornini).

**16. grein. Ásetingar fyri øki D (Vegir og parkering)**

1. Lagdir verða av vegir við leið og legu, sum er tilskilað í kortskjali, sum er partur av byggisamtyktini.

2. Yvirhøvur verður roynt at sleppa frá beinleiðis útkoyringum frá sethúsum út á alfaraveg.

3. Mál um bygging fram við landsvegi skulu viðgerast sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir.

**17. grein. Ásetingar fyri øki E (Almenn endamál).**

1. Øki verður lagt av til almennar stovnar, frálæru, heilsurøkt, mentanarlig- og átrúnaðarlig endamál, kirkjugarðar, lendingar, neystaøki o.t.

2. Innanfyri økispartarnar mugu bert verða gjørd virkir, hús ella íbúðir, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.

3. Eisini skal, innanfyri økispartarnar, bert verða gjørd virkir, hús ella íbúðir, ið samsvara við tað virksemi, sum er har frammanundan.

4. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,4.

5. Byggjast má bert eftir góðkendari byggiætlan fyri náttúrliga avmarkað øki.

**18. grein. Ásetingar fyri øki F (Almenn frítíðarøki).**

1. Økið verður lagt av til ítróttarvøllir, spælipláss, útiverupláss o.t.

2. Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.

3. Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiætlan, sum bygdarráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri øki.

4. Planting av runnum og trævøkstri kann bert fara fram eftir plantingarætlan, sum bygdarráðið hevur góðkent.

**19. grein. Ásetingar fyri øki G (Fríøki).**

1. Frílendi er bøur og lendi, ið ikki má byggjast á. Hetta er lendi, ið lagt er av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.

2. Á teim í 1. stk. nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar, hús ella virki, ið samsvara við endamálið við økinum.

3. Útstykking má ikki fara fram.

**20. grein. Ásetingar fyri øki H (Landbúnaður).**

1. Økið er tað, ið eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, vakstrarhús, grótbrot, fiska alistøðir o.a.

2. Loyvt er bert at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við endamálum, ið nevnd eru í 1. stk. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vega hald.

3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

4. Tá talan er um byggiloyvi eftir hesi grein, skal neyv frágreiðing av virkseminum og váttanir liggja við umsóknini, og er byggiloyvi treytað av, at kommunustýrið samstundis góðkennir frágreiðingina.

Í samband við landbúnað skal lýsingin minst fevna um:

a. grundarlagið fyri virkseminum

b. hvussu rakstur verður skipaður

c. hvat slag av djórahaldi talan er um

d. hvussu stórt talið av djórum verður

e. taðingarætlan

5. Hóast ásetingarnar í stk. 4, kann byggjast ein bygningur í einari hædd á traðarstykki, har mesta víddin á bygninginum er 20 m². Á traðarstykki har bygningur er frammanundan, kann loyvi bert verða givið til at byggja eitt goymslurúm, sum í mesta lagi er 10 m² afturat verandi bygningi.

6. Bygging má einans fara fram, aftaná at loyvi er fingið frá friðingarnevndini, sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

**21. grein. Ásetingar fyri øki I (summarhús)**

1. Loyvt er bert at byggja summarhús, sum standa fyri seg.

2. Netto nýtingarstigið má ikki fara upp um 0,2 fyri økið.

3. Hús mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki vera hægri enn 6 m til mønuna, mált frá miðal jørðildi (miðal við húsahornini). Ikki er loyvt at innrætta kjallara.

4. Summarhúsini kunna ikki nýtast til fastan búðstað.

**22. grein. Ásetingar fyri øki J (havnarøki)**

1. Øki verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.

2. Byggingarstigið fyri havnarøki sum heild má ikki fara upp um 0,3.

3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

4. Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 15 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.

## Byggingarfyriskipandi ásetingar

### 23. grein. Byggingarfráleikar

1. Øll bygging - undantikin tví- og raðhús o.t.- skal í minsta lagi vera 2,5 m. frá grannamarki.

2. Fráleikar í hesi grein skulu mátast vatnrætt. Fráleiki er stytsta strekkið millum eini hús ella part av tí til grannamark ella aðra bygging á sama grundøki.

3. Takskegg, vindskeiðir, vindfang og tílíkir smáir partar av bygningi, gjørdir úr tilfari sum kann brenna, kunnu vera 2 m frá grannamarki og vegmiðju.

4. Minsta fráleika frá kommunalum vegi ásetir kommunustýrið, meðan landsvegamyndugleikin ásetir fráleikan frá landsvegi.

5. Eingi hús og eingin húsalutur má gerast hægri enn, at fáast kunnu nóg góð ljósviðurskifti og hóskiligt samljóð við hús á sama grundstykki og hús á grannagrundum.

6. Frástøðan millum bilskúr, úthús o.t. bygningar sínamillum, somuleiðis fráleikin millum hesar smærri bygningar og sethúsini, kann verða minkaður niður í 1 m, um hetta ikki veksur um vandan fyri eldi. Útfyri vindeygu til búrúm og køk skal frástøðan tó í minsta lagi vera 2,5 m.

7. Útveggur á húsum, ið vendir móti granna marki og ikki er í minsta lagi 2,5 m. frá marki, skal gerast sum eldverjuveggur. Undantøk kunnu verða loyvd, um so er, at tað ber til fyri eldvanda, eitt nú, tá ið bygt verður sambært góðkendari heildarbyggiskipan fyri økið, ella so er, at trygd er fyri, at frástøðan millum húsini, ið venda móti markinum á teimum báðum grundstykkjunum, ikki verður minni enn 5 m.

8. Bilskúrar, hjallar, skúrar og smá úthús við ongum eldstaði, kunnu verða bygdir nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:

a. Hædd á planering verður ásett av byggivaldinum.

b. Bygningurin má ikki í einum fráleika upp til 2,5 m. frá grannamarki vera hægri enn 3,5 m.

c. Takvatn skal verða hildið á egnari grund.

d. Veggur móti grannamarki skal verða gjørdur sum eldverjuveggur. Frávik frá hesum er loyvt, tá ið tað ikki veksur um vandan av eldi.

9. Umsóknir sambært 7.-, 8., og 9. petti í hesi grein verða viðgjørdar samsvarandi grein 10, - undantaksloyvi - 2. petti.

10. Hesir fráleikar og annars teir, ið umrøddir eru í ásetingunum, verða máldir vatnrætt uttan at rokna við jarðarmuni og hornrætt á markið.

11. Byggivaldið kann í aðramáta loyva smáum húsalutum, ið vanliga standa fram úr sjálvum húsunum, t.d. grund, trappum, ljóskassum, altanum (svalum) og tílíkum, at standa fram um byggi- og veglinjur.

12. Allar útsíður á húsum, ið eru fríar, skulu gerast úr slíkum tilfari og vera soleiðis viðgjørdar, at tær saman við teimum húsum, ið standa í nánd, geva góða heildarmynd. Eisini skulu húsini í sniði og útsjónd yvirhøvur vera soleiðis, at tey fella væl inn í lendi og grannalag.

**24. grein. Atgongd frá vegi til óbygd øki**

1. Tann fyriskipaða atgongdin frá vegi til tún, skal altíð vera nóg væl upplýst og farbar, og má ikki verða gjørd nýtsla av henni á nakran hátt sum til dømis til bilstøðil, goymslu ella tílíkt, ið er ímóti tí, ið hon varð ætlað til.

2. Bjargingaramboðini hjá sløkkiliðinum og sjúkraflutningur skulu altíð ótálmað sleppa inn á grundina.

**25. grein. Útrokning av nýtingarstigum o.a.**

1. Størsta loyviliga byggingarvídd verður ásett fyri hvørja einstaka grund sum eitt lutfall millum grundvíddina á húsunum og víddina á grundøkinum. Talið, ið soleiðis kemur út, merkir byggingarstigið.

2. Størsta loyviliga ummál av byggingini verður ásett fyri hvørja einstaka grund sum eitt lutfall millum hæddarvíddina og víddina á grundøkinum. Talið, ið soleiðis kemur út, merkir nettonýtingarstigið.

3. Hæddarvíddin á einari bygging verður útroknað við at leggja saman allar hæddirnar. Mátið verður roknað frá útsíðuni á teimum avmarkandi útveggjunum.

4. Víddin á tí partinum av kjallarahæddini, ið hevur eina fría hædd, sum er minst 2,30 m, og

gólvið liggur yvir lægsta jørðildi, verður roknað uppí við 50%.

5. Er eingin kjallari, kann byggivaldið fyri vanlig sethús loyva, at 10% verður lagt aftrat mest loyvdu samlaðu gólvvíddini.

6.
a. Víddin á nýtandi loftshædd verður roknað sum í mesta lagi 60% av hæddini beint niðri undir.
b. Víddin á nýtandi loftshædd, sum hevur eina fría hædd, ið er minst 2,30 m, verður roknað sum víddin á vatnrættum plani 1,50 m omanfyri loftsgólvið, mált innan.

## Trygging og útinning av byggisamtyktini

### 26. grein. Lógargrundarlag

Av øðrum lógum og kunngerðum, ið hava týdning fyri byggisamtyktina, kunnu nevnast:

1. Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

2. Løgtingslóg nr. 19 frá 16.sept. 1948 um friðing av fornminnum og bygningum

3. Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving

4. Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd

5. Kunngerð nr. 45 frá 9. mai 1992 um brunaverju og brunatrygd.

6. Løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a.

### 27. grein. Samanhangur og aðrar skipanir

Umframt byggisamtyktina, er ein røð av sektorskipanum, ið hægri myndugleikar greiða úr hondum sum t.d. vega- og havnarlagsskipanir, el-veitingarskipanir, skipanir fyri útbygging av undirvísingar- og heilsu verkunum o.a.m.

### 28. grein. Samtykt og trygging

1. Byggisamtyktin skal vera samtykt av kommunustýrinum og góðkend av landsstýrinum.

2. Byggisamtyktin gevur kommunustýrinum rætt til at gera eina stigbýting, t.v.s. frágreiðing um í hvørjari raðfylgju økini eiga at verða bygd og at ognartaka jørð, ið hevur alstóran týdning fyri at tryggja ein heildar vøkstur.

3. Har tað ræður um at tryggja tilskapan í staklutum av einum økisparti, kann verða rúmkað um ásetingarnar í byggisamtyktini við at gera serstaka byggisamtykt.

## 29. grein. Kunngerð og tinglýsing

1. Áðrenn uppskot til byggisamtykt ella serstaka byggisamtykt verður sent landsstýrinum, skal tað verða lagt fram til almenna eftirskoðan í minsta lagi 3 vikur aftaná, at hetta hevur verið almannakunngjørt.

2. Møgulig mótmæli og broytingaruppskot til uppskotið skulu vera bygdarráðnum í hendi, áðrenn 6 vikur eru gingnar frá kunngerðardegnum.

3. Mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki samtykkir í, skulu fylgja við uppskotinum tá hetta verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

4. Endalig góðkenning av byggisamtykt og bygdaplani verður fráboðað alment við kunngerð.

Soleiðis samtykt av Sumbiar kommunu tann 09.10.2015

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 15/00975 og 16/01293 |
| Ætlanarskriv: | 9/5 2015 |
| Góðkent: | 21/11 - 2016 |
| Váttað: | |